# Jólakalendarin 2006

## Jólamaðurin sletar líkasum Trøllapætur



Trøllapætur og omman sparkaðu kavin av sær, áðrenn tey fóru inn í trøllahúsið. Tey hevði verið ein frálíkur dagur við nógvum spentum og kátum børnum, jólasangum, rock and roll og undirhaldi.

Og lítla trøllababy hevði eisini verið til ta einu konsertina og sungið lagið "Da-da-da."

Jú, tað var sanniliga gott at vera trøll í Føroyum.

Og stuttligast og best var um veturin, tá ið kavin lá tjúkkur oman ímóti bygdini og kuldin beit í kjálkamuurnar og í halan. Trøllapætur setti seg beinanvegin við eldstaðið fyri at fáa hita og høvur og kropp. Omman var skjót at seta ketilin útá, soleiðis at trøllini bæði kundu fáa okkurt heitt at drekka.

– Oy, oy, oy omma. Jólakalendarin! Kann eg sleppa at lata lúkuna upp nú?

– Ja, vælsignaði. Vita nú hvat spennandi er at síggja.

Trøllapætur potaði fingurin innundir áttatalið lat lúkuna upp við stórum spenningi.

– Kom og síggj, omma. Ein sleta, omma. Akkurat líka sum tær sum børnini skreiða við.

– Sum handan er fín, Trøllapætur. Hon hevur róður at stýra við og er næstan líka grøn sum jólatræið í bygdini.

– Kann eg fáa eina sovorðna sletu í jólagávu, omma. Bara eitt sindur størri?!

– Ja, nú veit eg ikki Trøllapætur. Omma hevur ikki so nógvar pengar og eg eri bangin fyri, at rumpan hjá tær kemur at sita føst í sletuni, um tær ikki fáast størri í handlunum. Men tú eigur framvegis sletuna sum tú fekst frá langabbanum og tað man vera gangari, ið dugur!

Trøllapætur hugsaði um tær mongu ferðirnar hann og trøllavinirnir høvdu spælt og beistast í kavanum. Einaferð høvdu hann og omman sletað og staðið á skíð í Jólamannalandi. Ta ferðina hevði Erling politistur verið eftir teimum, men hann kom at standa fastur í einari fjallafonn og tað stóð heilt illa til, tá ið jólamennirnir komu honum til hjálpar. Ja, jólamenn eru raskir at standa á skíð.

Men jólamaðurin í Grønlandi plagar ikki at standa á skíð. Hann sletur líkasum Trøllapætur. Á jólum, tá kavi er og stjørnuklárt kann ein vera heppin at síggja jólamannin koma við flúgvandi ferð í sletu við reinsdjórum spentum fyri. Hetta sá Trøllapætur sjálvur einaferð tá ið hann var pinkalítil. Og veiðimennirnir í Grønlandi sleta eisini! Teir lata treiskar hundar draga sletuna, tá ið teir halda avstað í kavanum og eftir ísinum.

Omman kíndi blídliga Trøllapæturi eftir heitu kjálkunum.

– Fittasta trøllið mítt! Nú mugu aftur fara at finna sletu og skíðfjølina fram. Onki er sum at hilla og skreiða eftir fjøllinum í góðum kavaveðri. Tað hevur altíð dámað bæði smáum og stórum trøllum væl. Men tað er langt ímillum stórskava nú á døgum. Men næstu dagarnar fer at kava illa, so nú ræður um at hava skreiðifjøl og skíðir klárar . Í slíkum veðri nytta bilar og bussar lítið. Tað er gott fyri børn og ommum at fáa nógva fríska luft. Og so er tað eisini vakurt at hava reyðar kjálkar og hvítar flykrur í hárinum....

Trøllapætur gleddi seg longu til ímorgin. Tá skuldi hann spæla úti allan dagin.













Minst til í dag...



Minst til at skifta battaríini
á roykvarnaranum í dag

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari